# Sanggleðin einki viknað í 30 ár

Hoyrir tú sangin "Siglir tú lívsins hins stormandi hav" so sigur tú samstundis Ekklesia í Klaksvík. Í nærum fjórðingsøld hevur hesin sangurin verið at hoyrt í útvarpinum. Hann er tað í royndog veru enn, nú vit skriva ár 2006



*Teir tríggir hava sungið saman í skjótt 30 ár - og gera tað framvegis, f.v. Kristoffur Olsen, John Kári Jacobsen og Theodor Olsen. Um vikuskiftið skulu teir m.a. luttaka á hvítusunnustevnuni í Kollafirði. Norðoyatunnilin ger tað lættari hjá teimum at ferðast frá staði til stað*

GOSPEL

*Orð/myndir: Snorri Brend*

Bólkurin, ið festi henda sangin á band og síðani gav hann út, var mannaður við fýra ungum og virknum trúgvandi klaksvíkingum – brøðurnir Kristoffur og Theodor Olsen, John Kára Jacobsen og Nichels Lützen.

Teirra hægsta ynski var tá at boða gleðiboðskapin um Jesus út í sangi á ymiskum støðum. Í so máta er navnið á bólkinum eisini forpliktandi. Tað merkir nevniliga Guds samkoma ella kirkja.

Bólkurin er enn virkin, og er í dag mannaður við Kristoffur, Theodor og John Kára. Hóast árini eru gingin er sanggleðin ikki viknað.

Tað prógvaðu teir herfyri, tá teir vóru ein av bólkunum sum luttók á gospeltúrinum, sum Smyril Line skipaði fyri.

**Altíð sungið**

Skulu vit finna orsøkina til at Ekklesia yvirhøvur kom uppá tal sum luttakarar á ársins gospeltúri mugu vit skrúva tíðina samfull 28 ár aftur – ella kanska 29 ár.

Alt byrjaði við at fólk tóku seg saman og byrjaðu virksemi í og út frá Soli Deo Gloria í Klaksvík í 1977. Hóast Kristoffur var ungur, luttók hann eisini í hesum arbeiðinum.

– Vit hava faktiskt altíð sungið nógv, sigur hann.

Kristoffur kom sum heilt ungur við í streingjakórið sum var knýtt at andaliga arbeiðinum í KFUM&K í Klaksvík.

Meðan teir vóru í streingjakórinum var nógv ferðast runt kring landið at syngja til møtir, stevnur og onnur størri og smærri andalig tiltøk. So líðandi gjørdist tað til eina kvartett við hesum fýra monnunum.

**Trummurnar larmaðu**

Aftrat sær høvdu teir fleiri ljóðføri, m.a. trummur, sum ikki var so vanligt tá.

– Eg veit ikki, vit vóru kanska pionerar á hesum økinum. Tað vóru kortini ikki øll sum dámdu tað so væl, helst tí at tað var ov hart.

– Men vit hildu kortini á, væl inspireraðir av svenska bólkinum Samuelsons, greiðir Kristoffur frá.

Um hesa tíðina vitjaði hesin kendi svenski gospelbólkurin ofta í Føroyum, og vóru limirnir í Ekklesia millum trúføstu áhoyrararnar á hesum konsertunum.

Teimum dámdu sangirnar so mikið væl, at teir settu seg at umseta fleiri teirra – bæði Kristoffur og bróðurin Theodor. Og tá farið varð undir tey sonevndu tjaldmøtini á Gøtueiði vóru teir í bólkinum millum nógv brúktu sangkreftirnar.

– Vit skrivaðu okkurt sjálvir, men flestu sangirnir vóru kortini slíkir, sum vit umsettu.

**Bond í hópatali**

Sohvørt sum árini gingu og teir gjørdist meiri kendir millum fólk, kom hugskotið at geva eitt band út. Hetta eydnaðist í 1982.

Um hesa tíðina komu rættiliga nógv bond út – eisini nógv bond við andaligum innihaldi. Millum hesi kann nevnast Kvartettin í Betesda, Midnáttar-sangbólkurin Heimamissións-sangbólkurin og Petur Oluf og Niels.

Hetta varð orðað við leiðsluna í Soli Deo Gloria og hagani fingu teir fullan stuðul til ætlanina. Semja var um, at hetta skuldi ikki gerast fyri egnan vinning, men fyri at stuðla samkomuni.

- Um nakar vinningur fekst burtur úr, so skuldi hann fara óskerdur til arbeiðið í samkomuni, sigur Kristoffur.

Hesir ungu menninir løgdu til brots – ikki í einum nútíðar studio, men heima í stovuni við einum leigaðum bandupptakara.

**Eitt band eftir einari viku**

Teir skipaðu upptøkurnar soleiðis, at teir stóðu í stovuni og sungu, meðan trummurnar stóðu í køkinum, so at tær ikki skuldu gerast ov harðar í mun til sangin.

– Ja, tað er ótrúligt at vit gjørdu tað á henda hátt, og at vit tóku alt upp ísenn, sigur hann við einum brosi.

Upprunaliga var ætlanin at taka eina og eina rødd upp og síðani miksa alt saman. Men skjótt funnu teir útav, at hetta fór ikki at ganga.

– Men líka veit eg. Vit tóku fleiri sangir umaftur, men at enda høvdu vit 12 sangir í kassanum.

– Hóast hesar serstøku umstøðurnar, tóku vit alla fløguna upp eftir einari viku!!

Hetta bandið var í fyrsta umfari margfaldað í 1000 eintøkum hjá Regini Bjarnastein, men stutt eftir varð neyðugt at gera 500 aftrat.

At bandið fekk so góða móttøku – og at sangir hagani enn eru at hoyra í teimum trimum útvarpsrásunum – kemur uttan iva av tí eina sanginum "Siglir tú lívsins hins stormandi hav".

Tað sjáldsama er, at eftir røttum ætlaðu teir als ikki at hava henda sangin við á bandinum!

**Kvøðuljóma-hitt**

– Nei, sigur Kristoffur. Eg var sjálvur einki við uppá at hava henda sangin við!

Tað var upprunaliga Olvheðin Jacobsen, pápi John Kára sum kom við hesum hugskotinum:

Hví ikki taka henda sangin við á bandið?! Og hví ikki prýða permuna við eini mynd av Skálabergi í einum aldubroti?!

– Sjálvur helt eg ikki at hann skuldi við á bandið, tí vit høvdu ikki havt hann við í sangskrá okkara.

– Men eg veit ikki. Vit avgjørdu so kortini at taka hann við og hava hann sum fyrsta lag á síðu A!

Tað skuldi kortini vísa seg, at júst hesin sangurin kom at sláa rættiliga ígjøgnum: Hesin sangurin var í royndog veru við í nærum hvørjari kvøðuljómasending.

Tá var nærum ikki ein slík sending, har sangurin ikki var við. Og mín sann um støðan ikki er tann sama í dag, nærum eina fjórðingsøld seinni. Lurta bara eftir kvøðuljómunum til sjófólkið í Útvarpi Føroya mikumorgnar!

– Ja, so snedugt kann tað verða!, sigur Kristoffur.

**Havið og føroyingar**

Hví júst hesin sangurin gjørdist so væl umtóktur, hevur Kristoffur sína frágreiðing um:

Hann vísir til, at føroyingar altíð hava verið eitt siglandi fólk, og tykjast dáma væl slíkar sangir sum hava við sjógvin og sjólívið at gera.

Hinvegin so var hesin sangurin væl kendur millum fólk innan Heimamissiónina og Brøðrasamkomuna í Føroyum, eins og hann var við á fløguni "Á lívshavsins bylgju" við Anniku og Sigrið á sinni.

– Tað er líkasum at havið sigur føroyingum nakað serligt. Tað liggur í føroyinginum at hava havið við sær, og júst tað er eisini við í sanginum.

Hetta bandið er higartil einasta útgávan hjá Ekklesia, men teir hava við millumbilum tosað saman um at geva okkurt út aftur.

– Men eg veit ikki. Enn eru vit ikki komnir so langt. Tað manglar kanska bara tað at vit taka okkum saman!, sigur Kristoffur.

**Familjufyritøka**

Frá fyrstu tíð hevur ætlanin við Ekklesia verið greið: At syngja gleðiboðskapin út um Jesus.

Tíðina áðrenn og eftir útgávuna av bandinum vóru teir í bólkinum nógv at hoyra á møtum kring landið.

Hetta vardi nakað inn í 80-árini, men síðani gingu eini 10 ár, har teir ikki sungu so nógv saman.

Miðskeiðis í 90-árunum byrjaðu teir so smátt at syngja meiri saman, og síðani hevur tað bara vundið meiri og meiri uppá seg.

Samstundis við hetta kann staðfestast, at sanggleðin ikki bert er at finna hjá teimum trimum – Kristoffur, Theodor og John Kára. Yngra ættarliðið vísir eisini sama áhugan.

Hetta fingu áhoyrararnir umborð á Norrønu eisini møguleika at hoyra meiri til, tá synir teirra spældu undir á gospeltúrinum: Sonur Kristoffur, Hans Andreas spælir trummu, og sonur Theodor, Hendrik spældi keyboard. Saman við teimum luttóku Jákup Martin Poulsen, ið er svágur John Kára og Jógvan Jacobsen, beiggi John Kára.

– So tú sært. Hetta er mestsum ein familjufyritøka, sigur Kristoffur við einum brosi.

## Sangur á landi og sjógvi

Limirnir í Ekklesia hava sum nevnt sungið á mongum støðum kring landið – í samkomuni í Klaksvík, við møtir í Havn, Porkeri, Vágum, Skopun og aðrastaðni.

Teir hava eisini sungið í Oasuni í Hoyvík, m.a. saman við Anniku og Sigrið. Tað var við eitt av hesum møtunum, at Sigrið greiddi teimum frá ætlaða gospeltúrinum við Norrønu.

– Hon spurdi tá, um vit høvdu hug at koma við. Og tja, – vit smekkaðu bara til, hóast hetta kanska var ein heldur stórur biti fyri okkum.

– Men vit hava ikki angrað ta eina løtu at vit fóru við. Hetta er ein veldigur møguleiki at boða gleðiboðskapin út við sangi okkara, sigur Kristoffur.

Hann fegnast um, at Smyril Line við ferðamannaskipi sínum gevur møguleika til ein slíkan gospeltúr.

– Hetta er avgjørt eitt pluss til Smyril Line, sigur hann.